Til lønararbeiðsbólkin
Stílað: Jógvan Amonsson, form.

Vegna forkvinnuna í § 25-nevndini, sum viðger uppskotið til løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna (løgtingsmál nr. 110/2018) loyvi eg mær at seta nevndini hendan spurning:

Nevndin mælir á bls. 33 í álitinum til, at varamenn á tingi, sum hava sæti á tingi í meira enn tríggjar mánaðir samanlagt í einum valskeiði, og framvegis sita á tingi 1 mánað áðrenn nýval, fáa fráfaringarsamsýning svarandi til 1 dag fyri hvørjar 16 dagar viðkomandi hevur tikið sæti á tingi, tó í mesta lagi 6 mánaðir.

Nevndin hevur sett spurning við støðuna, har varamenn, sum hava sæti á tingi fyri landsstýrismenn, ið síðan koma aftur í tingið, og varamaðurin sostatt fer út, uttan at val verður útskrivað, ikki skulu hava fráfaringarsamsýning. Hetta kann lættliga hugsast, um ein umskipan hendir í landsstýrinum, soleiðis at ein flokkur glíður út, og aðrir halda fram, uttan at nakað val verður hildið.

Spurningurin er tí, um nevndin hevur hugsað um hesa støðuna í sambandi við tilmæli sítt, ella um nevndin hevur gjørt sær nakrar tankar um hetta ?

Nevndin er eisini komin eftir, at munur er á orðingini um bíðiløn til varamenn í stutta tilmælinum frá arbeiðsbólkinum, og tí sum er endurgivið omanfyri úr tilmælinum við frágreiðing.

Nevndin umhugsar tí í løtuni at kalla arbeiðsbólkin inn til hoyring í málinum.

Vinarliga

Johnhard Klettheyggj
nevndarskrivari

LØGTINGIÐ

tel. +298 520294
johnhardk@logting.fo • logting@logting.fo • www.logting.fo